# Barnatannrøkt í 50 ár

*Myndir: Jens Kristian Vang*


*Tannlæknastjórin á barnatannrøktini Sigrid Arge*

Almenn móttøka var hjá barnatannrøktini í Tórshavnar Kommunu fríggjadagin 11. september í sambandi við at 50 ár eru liðin síðan tannrøktin varð sett á stovn.

Byrjað varð í Eikilund á skúlanum í Kongagøtu við tónleiki og sangi. Síðani var vælkomst har m.a. tannlæknastjórin Sigrid Arge og Halla Samuelsen, forkvinna í sosialunevndini, hildu røðu. Ein nýggjur felagssangur varð gjørdur til høvið og limir í Havnar Hornorkesturi og Finnur Hansen spældu aftur við føðingardagssanginum.

Eftir tað var farið úr Eikilund og yvir um vegin til tannlæknastovuna í barnatannrøktini í Tórsgøtu.

Har var opið hús við framsýning av eldri og núverandi tilfari, bæði á pappírsmyndum og á skíggjum runt um í húsinum.

Í 1959 kom tann fyrsta skúlatannlæknastovan við kommunalt settum tannlækna í Havn sum tann fyrsta av sínum slagi í Føroyum. Barnatalið 0-16 ár, ið fáa tilboð um tannrøkt í Suðurstreymi, eru í dag sløk 5.000 børn. Tilsamans 20 starvsfólk arbeiða í barnatannrøktini Tórshavnar kommunu, harav fimm tannlæknar og tveir tannrøktarar.

-red


*Erling Simonsen var fyrsti tannlæknin í barnatannrøktini*


*Halla Samuelsen heldur røðu*


*Heiðursportrið var ein stór tonn*


*Ein nýggjur sangur varð gjørdur til móttøkuna*


*Marna Debes, Eyðun Jensen og Oddmar á Steig hyggja at áhugaverdu framsýningini*

# Nýggj frímerkjarøð







Mikudagin, 16. september gevur Posta út nýggj frímerki, ið mynda ávikavist Leynar, dúgvur og altartalvur.

Frímerkið við Leynum er partur av einum samstarvi millum smá postverk í Evropa - nevnt SEPAC. Ólavur Frederiksen hevur tikið myndina av kavaklædda landslagnum við Leynar og er virðið á frímerkinum 10 kr.

Bládúgvurnar hevur Astrid Andreasen teknað og eru hesar av tí føroyska stovninum, sum er ein tann reinasti bládúgvustovnur í heiminum. Virðini á frímerkjunum eru 14 og 36 kr.

Jólafrímerkini í ár avmynda altartalvurnar í ávikavist Vestmanna og Hattarvíkar kirkju. Per á Hædd hevur tikið myndirnar. Báðar altartalvurnar eru gjørdar í hesari øldini av føroyskum listafólki.

Altartalvuna í Vestmanna kirkju hevur Astrid Andreasen myndað, meðan Katrin Andreasen hevur tilevnað hana. Oggi Lamhauge hevur málað altartalvuna í Hattarvíkar kirkju.

Virðini á frímerkjunum eru 6 og 10 kr. Harumframt koma fýra nýggj postgjaldsmerki eisini út. Fyrstu postgjaldmerkini